# Maður søkist til smoltstøð

Søkt verður eftir manni at arbeiða á smoltstøð okkara á Selatrað. Viðkomandi, sum settur verður skal luttaka í dagliga arbeiðinum á støðini so sum passan av smolti og umsiting av útgerð.

**Førleikar**
Viðkomandi, sum settur verður, hevur fyrimun um viðkomandi hevur kunnleika til arbeiði við aling, tó er hetta eingin treyt. Upplæring fer fram á staðnum og við førleikagevandi skeiðum. Tá uppgávurnar fevna um arbeiði við livandi fiski, vænta vit at tú hevur ábyrgdarkenslu. Eisini vænta vit, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt.

**Hvat kunnu vit bjóða**
Eitt spennandi umhvørvi við møguleika fyri at arbeiða sjálvstøðugt. Fyri rætta fólki er talan um eitt fast starv.

Løn sambært avtalu og eftir førleika.

**Hvørjir eru vit**
P/F Sandá hevur síðani 1985 framleitt smolt til føroysku sjógvalingina. Síðani 1990 hevur P/F Sandá framleitt laks/síl á sjónum og framleiða vit í dag umleið fýra túsund tons av laksi og sílum, sum vit kryvja á sláturvirki okkara í Vestmanna. Hjá P/F Sandá og atknýttum virkjum starvast í dag um 50 starvsfólk.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til smoltstøðina Klæmint Petersen á telefon 448598 ella til Høgna Jacobsen á skrivstovu okkara í Havn á telefon nr. 315274.

Umsóknir við møguligum prógvum, viðmælum og upplýsingum um starvsroyndir kunnu sendast til

**P/F Sandá**
Argjaboðagøta 7
FO-160 Argir

JAVNI

# Hvat kann geva lívsvirði

**Javni bjóðar til almennar fundir:**
Ymsir fyrilestrar, ið á ymiskum økjum lýsa lívsvirði hjá menningartarnaðum og sostatt okkum øllum.
Eisini er ætlanin at fundurin skal verða hugnakvøld við lokalum sangarum.

**Klaksvík. Fundur á Sjómansheiminum mánadagin 18. februar kl 19.00.**
Røðarar: Olga Biskopstø, samfelagsfrøðingur - Rúna Sivertsen, løgtingsumboð og Kári Lindberg, formaður í Autistafelagnum.

**Skála. Fundur í Ítróttarhøllini mánadagin 18. februar kl 19.30.**
Røðarar: Marja Lamhauge, formaður sosiala nevnd í Runavík - Helgi Johannesen, pápi, Jógvan Fríðriksson, prestur og Jústines Eliasen.

**Tórshavn. Fundur í Pállstovu mánadagin 18. februar kl 19.00.**
Røðarar: Jens Jensen, fyrrverandi formaður í Javna - Óluva Skaale, lærarinna og starvsfólk frá sambýlum og Beinta Petersen, mamma.

**Øravík. Fundur á hotellinum leygardagin 23. februar kl 15.00.**
Røðarar: Óli Holm, Landsstýrismaður - Doris Hansen, formaður í MBF - Jonna Djurhuus, mamma og Malena Arnholdsdóttir, næstformaður í Javna.

Øll eru vælkomin.

**Umboðsnevndin og starvsnevndin**

# ÚTBJÓÐING!

**av vaskingini av trægólvunum í skúlanum á Velbastað**

Kirkjubøar kommuna bjóðar við hesum vaskingina av trægólvunum í skúlanum á Velbastað alment út til áhugaði at røkja.

Vaskingin fevnir um 245 fermetrar av vanligum trægólvi í skúlanum eftir nærri ávísing frá kommununi m.a. viðvíkjandi slag av sápulúti.

Í fyrsta umfari skal vaskast 1 ferð um vikuna, helst fríggjadag, men kommunan tilskilar sær rætt at fremja broytingar hesum viðvíkjandi eftir nærri avtalu partanna millum.

Tilboð samsvarandi hesi útbjóðing skulu stílast
til Kirkjubøar kommunu, 176 Velbastað og verða kommununi í hendi í seinasta lagi 25. februar 2002 kl. 16.00

Kirkjubøar kommuna tilskilar sær rætt til frítt at velja ímillum innkomin tilboð ella vraka tey øll.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til kommunuskrivstovuna á Velbastað á tel 328106, Annfinn Brekkstein, borgarstjóra á tel 215800 ella Petur Juul Jacobsen, skrivara á tel 226458

team 85 • 316511

KIRKJUBØAR KOMMUNA

# ÁRSAÐALFUNDUR 2002

Boðað verður til ársaðalfundar á Parnassinum á Hotel Hafnia hósdagin 28. feb. 2002, kl. $19^{30}$.

Fundarskráin verður eftir § 18 í felagsins løgum

**Havnar Handverksmeistarafelag**

## Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag

# Uppstillingarfundur

Annar uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður á Hotel Tvøroyri

sunnudagin 17. februar kl. $15^{00}$.

**Nevndin**

# LBF søkir verkfrøðing

Vit søkja ein dugnaligan verkfrøðing til fjølbroyttar og spennandi projekterings- og eftirlitsuppgávur innan byggi- og anleggsfakini.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Hanus Hansen á telefon 314744.

**Landsbyggifelagið P/F, Ráðgevandi Verkfrøðingar**
Grønlandsvegur 5 · Postboks 228
E-mail: lbf@lbf.fo
110 Tórshavn

## Vit hava nú aftur fingið nakrar flugufangarar á goymslu



**Flugufangarnir eru sera effektivur og verða brúktir bæði privat og á virkjum, fjósum o.a.**

| | | |
|---|---|---|
| ALTI 2100 til rúm støddir uml. 50-80 $m^2$ | prísur einans | kr. 1.895,- |
| ALTI 2138 til miðal stór rúm uml. 100-150 $m^2$ | prísur einans | kr. 2.095,- |
| ALTI 2214 til rúm støddir uml. 200 $m^2$ | prísur einans | kr. 2.995,- |

**SPF. ALTING** tlf. 210 298 fax 318 591

Vit senda um alt landið

## Eysturoyar Javnaðarfelag

Aðalfundur felagsins verður í Fuglafirði mánadagin 4. mars kl. $20^{00}$.

Skrá sambært løgum felagsins.

**Nevndin**

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundur felagsins verður sunnudagin 3. mars kl. $16^{00}$ í húsum felagsins.

Skrá sambært løg.

**Nevndin**
Froðbiar sóknar Róðrarfelag



# Til krúndiamantbrúdleypsparið, Herborg og Torkil Strøm í Vági



Mánadagin tann 18. febr. eru 65 ár síðani foreldur okkara, Herborg og Torkil Strøm, giftust í Vágs kirkju. Eitt langt og virkið lív hava tey verið hjún og øllum hava tey bert gjørt væl. Og tí fegnast vit yvir, at tað nú kann unnast teimum at halda henda merkisdag, krúndiamantbrúdleyp, saman við teirra kæru.

Ein kend bygdamynd eru tey, sum bæði tey eldru og tey yngru eru góð við. Sum t.d. ta ferðina tey vóru farin til Havnar júst tann dagin VB vóru blivnir føroyameistarar í fótbólti. Sum vera man vóru tey nakað sein íland av Smyrli, og komu tey tí beint ímóti teirri øgiligi og ovurfegnu mannamúgvu, sum skuldi umborð suður til Vágs at feira sigurin. Nú var vandi á ferð. Men so róptu nøkur av teim ungu, tá tey sóu hesi bæði gomlu koma raggandi beint móti streyminum: "Oh jússøs, hygga Herborg og Torkil, kom og passa uppá tey"! Og so gjørdu hesi ungu manngarð so tey sluppu væl og trygt allan vegin gjøgnum ta stóru mannfjøldina, íð trokaði seg umborð.

Mamma er fødd 11. juni 1917 í Øravík. Foreldur hennara vóru Jóan Petur Mortensen og Hansina f. Hansen úr Tórshavn. Tey búðu í Mýruni í Øravík og har vaks mamma upp.

Mamma var tann sjeynda av tíggju systkin , og var bert 8 ára gomul, tá pápi hennara doyði.

Tað var tungt hjá ommuni at syrga fyri hesum stóra barnaflokki, men var tað ein stór hjálp at tann elsti sonur hennara var farin til skips og tí kundi hjálpa til við húsarhaldinum. Tað sum keypmennirnir á Tvøroyri fingu hendur á av fastari ogn, tað tóku teir, har var eingin miskunn. Undir sjúkalegu abbans vóru teyð komin at skylda eitt

Hetta sálmaorindi er eitt av yndisørindunum hjá mammu og pabba:

*Ótøld sum sandskorn smá og heimsins sáðið,*
*sum heimsins dýpi blá er Harrans náði,*
*við henni hvønn dag sál hann yvirhellir,*
*hvønn morgun mær í skál, ein náði uttan mál,*
*ríkt omanvellir*

sindur í onkrari krambúð.

Tá mamma var 15 ár gomul fór hon til Havnar í húspláss hjá Dia á Bø, hann var skyldur við mammu hennara, tvey ár seinri fór hon suður til Vágs og var í húsplássi har, til pabba og hon komu at kennast og seinnri giftist.

Vit vóru nógv í húsi - nógv stríð og strev, men altíð var mamma ljós í sinni, og tí var eisini lætt og ljóst inni. Hentleikar vóru ongir av tí slagnum, sum í dag gera alt arbeiði léttari. Men mamma hevði altíð stundir til okkara, var altíð har við onkrum góðum, tá vit komu úr skúla, hon fortaldi søgur og hon sang fyri okkum. Hon var hjartað og pulsurin í barnaheimi okkara. Seinni tá øll ommubørnini komu, hava tey øll fingið teirra rúm í breiða fangi hennara - og sum hon sigur: tað tekur longri og longri tíð at sovna um kvøldið, tí hvørt einasta navn skal nevnarst í kvøldbøn teirra.

Pabba er føddur í Vági 28. juli 1913. Foreldur hansara vóru Niels Petur Strøm, timburmeistari og Maria f. Hjelm, hann var frá Kráir og hon av Løðhamar. Pabba vaks upp á Løðhamri, saman við einum eldri bróðuri og einari yngri systir.

Hann smíðaði saman við pápa og beiggja sínum. Teir bygdu hús, og um vetrarnar smíðaðu og umvældu teir umborð á skipunum, tað var altíð nokk at gera. Tey fyrstu áruni eftir seinra heimsbardaga bleiv minni at gera, men tá fór pabba saman við øðrum timbirmonnum til Íslands at smíða nøkur ár. Heimkomin úr Íslandi bleiv hann heilsubrekaður í longri tíð, men hann fall ikki í fátt og kom fyri seg aftur. Hann keypti sær ein lastbil, og tá onki var at koyra, arbeiddi hann sum hjálparmaður hjá systkinabarni sínum, Viggo Dahl, sum hevði handilsvirki á Tjørn. Í fleiri ár koyrdi hann olju fyri Esso, til allar bygdirnar í sunnaru helvt og skipini við. Seinnri fór hann at smíða aftur, og hann var kendur sum ein sera raskur smiðir. Eitt kundi hann tó ikki fordraga, tað var at skriva rokningar fyri arbeiði, men hann var álítandi og vælgjørdur, og hann fekk altíð sítt.

Hann hevði eisini til ítriv at mála, landsløg einamest, og tað fæst hann við enn hóast 88 ára gamal. Tað eru mangar myndir sum hanga víða hvar í nógvum heimum. Tað, sum hann sá í nattúruni í okkara vakra landi, tað festi hann á lørifti sera hepnisliga.

Í nógv ár var pabba formaður fyri stýrið í missiónshúsinum í Vági. Nógv mugu tey eisini vera kring oyggjarnar, ið minnast blíðskapin í okkara heimið. Altíð høvdu tey fólk gistandi, tá missiónsvika var, og spennandi var at hoyra prátið við tey fremmandu í húsinum og hoyra nýggjar søgur.

Søgan um pabba og mammu er eisini søgan um eini hjún, sum nú í 65 ár hava elskað og styðjað hvønnannan, og har ein innilig guðstrúgv í øllum hesum langa og umskiftiliga tíðarskeiði hevur verið tann grundarsteinurin, íð samlív teirra hevur bygt á. Henda livandi gudstrúgv hevur borið gjøgnum trongar eins og ljósar tíðir, og hevur givið teimum styrki og tryggleika til at liva lívið í gleði og vón. Hetta eru teir tættirnir, teirra lívstráður er vovin av: guðstrúgvin, gleðin yvir allar lívsins gávur, og kærleikin til hvønn annan og alla teirra slekt.

Við hesum fylgdi eisini tað góða humørið, sum altíð lá ovast. Ótaldar eru løturnar, tá láturin rungaði í okkara heimi yvir allar tær stuttligu søgurnar, ið vóru havdar á lofti. Mong vóru tí eisini tey, sum javnan stukku inn á gólvið, tí tað var hugnaligt og lívgevandi. Og sjálvt um allir teirra javnaldrar nú eru farin, so er tað tíbetur enn so, at eisini tey yngru í grannalagnum og í familjuni støkka inn á gólvið, so tey sita ikki í einsemi um dagarnar og kúra. Er tað ein góður dagur, tá sólin sær, so kunnu tey seta seg útum á trappuna, og altíð støðgar onkur á, sum fer framvið.

Hóast túrarnir nú eru sjáldnir og stuttir, so frøast tey enn sum fyrr um náttúruna. Ikki bara ferðirnar niðan á Eggjarnar, Múlan, Ryskivatn ella vestur á Eiðið - eisini úr køksvindeyganum lærdu tey okkum at frøast um náttúruna: hagani fylgdu vit við hvørt einasta vár, hvussu sólin petti fyri petti kom longur oman í Hvannadal, tá vit aftur hoyrdu tey fyrsti tjøldrini, tá lombini aftur sóust niðanfyri garðarnar og bøurin bleiv gulur av sóljum - tá mátti tú syngja, og sangur var nógvur í okkara heimi.

Mamma og pabba høvdu vakra songrødd og vóru nógv ár í kirkjukórinum "Ljómur". Pabba var við frá fyrsta degi, mamma kom uppí skjótt eftir tað. Hvønn sunnudag og hvørja hátíð setti kórið dám á guðstænasturnar. Fram um alt var tann árliga konsertin allahalgannasunnudag - "Nú hvítna tindar fjøllum á" var fastur á skránni, og enn ornar hjartað hvørja ferð við hendan sálmin. Her í Ljómi vórðu tey við í einum ríkum samfelagi við Edith Dahl á odda. Her varð eisini nógv skemt og látur. Tey spældi sær á útfluktum norður í Dal ella á Lopranseiðið, tey spentu seg út og hugnaðu sær saman til konsertir kring oyggjarnar, og tey høvdu minniríka ferð til Noregs og Danmarkar saman.

Alt hettar vit hava nevnt - og nógv aftrat, sum her ikki er rúm fyri - eydnaðist mammu og pabba at geva víðari til okkum, teirra børnum, ommu- og abbabørnum.

Nú sól stendur lágt, vóna vit fyri tykkum, at roðin av vesturskininum vil gylla tað av lívsleiðini, sum tykkum er máld at vera eftir. Við orðunum íð standa undir hesu vøkru myndini av tykkum báðum, ynskja vit tykkum hjartaliga tillukku á krúndiamantbrúdleypsdegnum.

**Tórgir, Marita, Jonhild, Hans Pauli og Maria**